tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Samanbering av skattatølum fyri oktober og árinum sum heild | 2 |
| 2 | Framroknað fíggjarætlan 2017 fyri Suðuroyar Barnaverndartænastu | 2 |
| 3 | 2. viðgerð av fíggjarætlan 2018 hjá Tvøroyrar kommunu | 3 |
| 4 | Kunning um setan av køkshjálp í barnagarðinum | 5 |
| 5 | Afturlatið mál, skrásett sum pkt. 8 | 5 |
| 6 | Ognarviðurskifti viðvíkjandi eldrabústøðum - sambýlið við Sílánna | 6 |
| 7 | Fámjins kommuna sigur upp samstarvi við Tvøroyrar kommunu um frítíðarskúla | 7 |
| 8 | Uppskot til viðtøkur fyri foreldraráðini í ávíkavist dagstovni og dagrøkt | 8 |
| 9 | Støðutakan, um skjalasavnið sum rakstrarstað skal loysast frá bygdasavninum | 9 |
| 10 | Kunning frá Suðuroyar Musikkskúla | 11 |
| 11 | Støðutakan til leigusáttmála viðv. skrivstovuhøli hjá Sernám í Vági | 12 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.00.00-I00-1-17**

## 1. Samanbering av skattatølum fyri oktober og árinum sum heild

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um skattatølini fyri oktober og í árinum sum heild.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Skjøl

- Samanbering av skattatølum í oktober og árinum sum heild
- Samanbering av skatti 2017 og undanfarin ár

**27.18.00-A21-2-16**

## 2. Framroknað fíggjarætlan 2017 fyri Suðuroyar Barnaverndartænastu

### Málsfrágreiðing

Kunning frá fíggjarleiðaranum um, at framrokningin hjá Suðuroyar Barnaverndartænastu fyri 2017 vísir eitt hall á góðar 155. tús. kr. Harav skal Tvøroyrar kommuna gjalda áleið 58. tús. kr., sí viðfestu framrokning. Til umrøðu og støðutakan í býráðnum.

**Sosiala nevnd, 2. november 2017, pkt. 3:**
Sosiala nevnd tók kunningina um framrokningina fyri 2017 hjá barnaverndartænastuni til eftirtektar. Sosiala nevnd samtykti, at mæla til, at Tvøroyrar kommuna betalir meirútreiðsluna á 58 tús. kr.

**Fíggjarnevndin, 2. november 2017, pkt. 2:**



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Fíggjarnevndin tók undir við tilmælinum frá sosialu nevnd um, at Tvøroyrar kommuna betalir meirútreiðsluna hjá barnaverndartænastuna fyri 2017 á 58. tús. kr.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá sosialu nevnd og fíggjarnevndini um at gjalda meirútreiðsluna hjá Suðuroyar Barnaverndartænastu fyri 2017 á 58. tús. kr.

### Skjøl

- Framrokning BVT 2017.pdf
- Framrokning BVT 2017.pdf

**00.30.10-A00-1-17**

## 3. 2. viðgerð av fíggjarætlan 2018 hjá Tvøroyrar kommunu

### Málsfrágreiðing

2. viðgerð av fíggjarætlanini hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2018 til viðgerðar í býráðnum. Høvuðstølini eru hesi:

Skattaprosentið er 21,90% og barnafrádrátturin er kr. 7.000,-

Inntøkur av persónskatti eru komandi ár mettar til 55,6 mió. kr. og inntøkur av partafelagsskatti 1,0 mió. kr., íalt 56,6 mió. kr.

Inntøkurnar samanlagt hjá Tvøroyrar kommunu komandi ár eru mettar til 74,3 mió. kr. íroknað afturbering fyri eldraøkið ímeðan rakstrarútreiðslurnar eru mettar til 66,5 mió. kr. Avlopið í rakstrinum er sostatt 7,8 mió. kr.

Íløgurnar hjá Tvøroyrar kommunu komandi ár eru 27,012 mió. kr., og fata um hesi øki:

§ 1 Fyrisiting: kr. 100.000,-



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

§ 3 Børn og ung: kr. 10.240.000,-

§ 4 Undirvísing: kr. 704.000,-

§ 5 Mentan og frítíð: kr. 125.000,-

§ 6 Teknisk mál: kr. 12.213.000,-

§ 7 Kommunal virki: kr. 3.630.000,-

Íløgurnar verða fíggjaðar við yvirskotinum av rakstrinum, lántøku og tøkum gjaldføri.

**Fíggjarnevndin, 3. oktober 2017, pkt. 2:**
Fíggjarnevndin samtykti einmælt 1. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2018 við sama skattaprosentið 21.90% og barnafrádrátt á kr. 5.000,-

Málið beint til víðari viðgerð í býráðnum.

**Býráðið, 9. oktober 2017, pkt. 2:**
Býráðið samtykti einmælt við 1. viðgerð fíggjarætlanina hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2018 við sama skattaprosenti og barnafrádrátti.

Evnisfundur um fíggjarætlanina 2018 verður á Hotel Vágum fyrst í november í ár. Býráðið ynskti í hesum sambandi, at vitja eldrasamstarvi í Vágum.

**Fíggjarnevndin, 13. november 2017, pkt. 2:**
Fíggjarnevndin samtykti, at viðmæla býráðnum til at samtykkja fíggjarætlanina hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2018.

**Avgerð**
Býráðið samtykti einmælt við 2. viðgerð, at góðkenna fíggjarætlanina hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2018.

**Skjøl**

- Yvirlit Fæ 2018 - 2022.pdf



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Sundurgreinan av íløgum 2018

**28.00.00-13-17**

## 4. Kunning um setan av køkshjálp í barnagarðinum

### Málsfrágreiðing

Kunning til býráðið um, at Helena Petersen er sett í starv sum køkshjálp í barnagarðinum Mýrifípan.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum um starvssetan sum køkshjálp í barnagarðinum til eftirtektar.

**00.01.10-I00-20-17**

## 5.

**27.00.00-A00-1-16**

## 6. Ognarviðurskifti viðvíkjandi eldrabústøðum - sambýlið við Sílánna

### Málsfrágreiðing

Samskift hevur nú verið í eina tíð um eldrabústaðir í Suðuroynni sum ein felagsogn hjá Bú- og Heimatænastuni og keyp av sambýlinum við Sílánna í hesum sambandi. Málið varð umrøtt á síðsta fundi í sosialu nevnd og aftur í dag í fíggjarnevndini, sí viðløgdu skjøl í málinum.

Viðfest er eisini yvirlit yvir bíðalista á ellisheimum og sambýlum í Suðuroynni umframt skrivligt svar frá Onnu Djurhuus, leiðara, viðvíkjandi teimum spurningum, sum Súsanna Bertholdsen, býráðslimur, setti Bú- og Heimatænastuni áðrenn kunningarfundin við býráðið tann 9. oktober í ár.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Sosiala nevnd, 2. november 2017, pkt. 2:**
Sosiala nevnd tók kunningina frá forkvinnuni til eftirtektar og beindi málið til víðari viðgerð í býráðnum.

**Fíggjarnevndin, 13. november 2017, pkt. 6:**
Fíggjarnevndin tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar, at tað er gongd í málinum, sum stýrið fyri Bú- og Heimatænastuni stendur fyri. Málið til umrøðu í býráðnum.

**Avgerð**
Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar, og at stýrið fyri Bú- og Heimatænastuna arbeiðir við málinum.

## Skjøl

- Svar til Mikkjal Sørensen í.s.v. tilsendan av tilfari um fíggingarleist
- Kunning frá Mikkjal Sørensen viðv. svarið frá advokati
- 17-00567-2 Viðv. Hamragarði, Vági.pdf
- Kunning frá Mikkjal Sørensen viðv. svar frá advokati
- Telefonnotat - samrøða við Egon Joensen, fulltrúa í FMR
- Notat frá fundi í dag við stýrisformann Mikkjal Sørensen
- Svar til Tværoyrar kommunu viðv ætlanum um felagsogn av eldrabústøðum í Suðuroy.pdf
- Yvirlit yvir bíðilista á ellisheimi og sambýli
- Svar uppá fyrispurningar frá býráðslimum hjá Tværoyrar Kommuna.docx
- Teldubræv við svar uppá spurningar



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**27.00.00-I00-10-17**

## 7. Fámjins kommuna sigur upp samstarvi við Tvøroyrar kommunu um frítíðarskúla

### Málsfrágreiðing

Jónis Nielsen, borgarstjóri í Fámjins kommunu, kunnar í brævi, dagfest 29. oktober 2017, um, at Fámjins kommuna sigur upp samstarvi við Tvøroyrar kommunu viðvíkjandi tilboðnum um frítíðarskúla, sí viðfesta bræv.

**Sosiala nevnd, 2. november 2017, pkt. 5:**
Sosiala nevnd tók kunningina frá Fámjins kommunu og hevur ikki nakrar viðmerkingar til, at Fámjin sigur upp samstarvi við Tvøroyrar kommunu viðvíkjandi tilboðið um frítíðarskúla.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Skjøl

- Bræv til Tvøroyrar kommuna.pdf
- Teldubræv við brævi frá Fámjins kommunu



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**27.00.00-A00-3-17**

## 8. Uppskot til viðtøkur fyri foreldraráðini í ávíkavist dagstovni og dagrøkt

### Málsfrágreiðing

Uppskot til viðtøkur fyri foreldraráðini í ávíkavist dagstovni og dagrøkt hjá Tvøroyrar kommunu til umrøðu og støðutakan, sí viðfestu viðtøkur.

**Sosiala nevnd, 2. november 2017, pkt. 6:**
Sosiala nevnd samtykti, at góðkenna viðtøkur viðvíkjandi foreldraráðið fyri ávíkavist dagstovn og dagrøkt.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá sosialu nevnd um at góðkenna viðtøkur fyri ávíkavist dagstovnin og dagrøktina hjá Tvøroyrar kommunu.

### Skjøl

- Uppakot til viðtøkur fyri foreldraráðini í dagstovni og dagrøkt
- Viðtøkur fyri foreldraráðið í dagrøktarskipanini hjá Tvøroyrar kommunu.docx
- Uppskot til viðtøkur fyri foreldraráðini, send Kari og Marit til viðmerkingar

**19.02.00-A00-1-17**

## 9. Støðutakan, um skjalasavnið sum rakstrarstað skal loysast frá bygdasavninum

### Málsfrágreiðing

Kári Jespersen og Jens Pauli Nolsøe, søgufrøðingar, hava fingið játta stuðul frá ávíkavist Tvøroyrar býráð og Mentamálaráðnum til at arbeiða við at skipa eitt økissjalasavn á Tvøroyri heruppií, at skriva Tvøroyrar søgu. Fundur hevur í hesum sambandi verið við stjóran á Landsskjalasavninum



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

um hvussu víðari skal farast fram í sambandi við hesa 3-ára royndarverkætlan, sí viðfestu skjøl í málinum.

Býráðið skal nú taka støðu til, um skjalasavnið sum rakstrarstað skal loysast burtur frá bygdasavninum sum eitt sjálvstøðugt rakstrarstað. Mentanarnevndin tilmælir hesum. Fornminnisfelagið á Tvøroyri v/Einar Larsen, formanni, er kunnaður telefoniskt 10. november 2017 hesum viðvíkjandi, og hann hevði ikki viðmerkingar til henda leist.

Harumframt skal býráðið formliga tilmæla lim í stýrisbólkin í sambandi við verkætlanina.

**Mentanarnevndin, 28. august 2017, pkt. 8:**
Mentanarnevndin samtykti, at Kári Jespersen, søgufrøðingur, fer í holt við at skriva Tvøroyrar søgu og skipa skjalasavni á Tvøroyri sambært tí endamáli, sum játtan er til á fíggjarætlanini fyri 2017.

Mentanarnevndin beinir málið til víðari viðerð í fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin, 11. september 2017, pkt. 9:**
Fíggjarnevndin samtykti, at játta Kára Jespersen, søgufrøðingi, eitt verkætlanarstarv í 3. mánaðir frá 1. oktober 2017 at rokna til at menna skjalasavnið á Tvøroyri, har Kári Jespersen verður løntur sambært sáttmálanum millum Yrkisfelagið Miðnám og Fíggjarmálaráðið, á hægsta stigi sambært cand. mag. stiganum við 2,75 í eftirlønargevandi viðbót. Býráðið tekur endaliga avgerð í málinum.

**Býráðið, 11. september 2017, pkt. 5:**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini um at játta Kára Jespersen, søgufrøðingi, eitt 3-mánaða verkætlanarstarv til at menna skjalasavnið á Tvøroyri.

**Mentanarnevndin, 1. november 2017, pkt. 9:**
Mentanarnevndin samtykti, at Tvøroyrar skjalasavn verður stovnað sum serstakt rakstrarstað uttanfyri Tvøroyrar Fornminnisfelag. Hetta skal staðfestast í býráðnum, men fyrst umrøðast við umboð fyri Fornminnisfelagið og Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn.

Viðvíkjandi limi í stýrisbólkin fyri verkætlanina, so mælir Kristian Roest til, at Súsanna Bertholdsen verður stýrislimur.

Endalig avgerð um stýrislim verður tikin á komandi býráðsfundi.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at loysa skjalasavnið sum rakstrarstað frá Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavnið.

Viðvíkjandi umboð frá Tvøroyrar býráð í stýrisbólkin fyri 3-ára verkætlanina um Tvøroyrar Skjalasavn, mælir mentanarnevndin til, at Súsanna Bertholdsen verður stýrislimur.

Borgarstjórin upplýsti, at tað er siðvenja, at formenn/forkvinnur í nevndum hjá býráðnum, verða vald í stýrisbólkar, sum liggja undir avvarðandi nevnd. Borgarstjórin hevur tí broytingaruppskot til stýrislim, sum er Anita Vibergsdóttir.

Atkvøðugreiðsla um broytingaruppskoti hjá borgarstjóranum: Anita Vibergsdóttir sum fastan lim í stýrisbólkin og Súsonnu Bertholdsen sum varalim í stýrisbólkin. Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri broytingaruppskotinum. Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu ímóti broytingaruppskotinum.

Atkvøðugreiðsla um tilmæli frá mentanarnevndini, at Súsanna Bertholdsen verður limur í stýrisbólkin. Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu fyri. Eingin atkvøða var ímóti.

Súsanna Bertholdsen sostatt vald í stýrisbólkin fyri 3-ára verkætlanina um skipan av Tvøroyrar Skjalasavn.

## Skjøl

- Umsókn
- Umsókn um økisskjalasavn (stílað til Landsstýrið)
- Fundarfrágreiðing endalig - frá Sámal Tróndur
- Fundarfrásøgn frá verkætlanarleiðarunum
- Notat í sambandi við fund á Landsskjalasavninum
- Bræv frá Mentamálaráðnum til Kára Jespersen og Jens Paula Nolsøe
- Bræv frá Mentamálaráðnum, at býráðið tilnevnir lim í stýrisbólk



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**20.07.00-1-17**

## 10. Kunning frá Suðuroyar Musikkskúla

### Málsfrágreiðing

Kunning frá leiðaranum um virksemi í Suðuroyar Musikkskúla pr. 1. oktober 2017, sí viðfestu kunning.

**Mentanarnevndin, 1. november 2017, pkt. 14:**
Mentanarnevndin tók kunningina frá Suðuroyar Musikkskúla til eftirtektar og ynskti, at Tvøroyrar býráð bleiv kunnað um málið.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá Suðuroyar Musikkskúla til eftirtektar.

### Skjøl

- Dagførandi kunning um Suðuroyar Musikkskúla.docx
- VS: Dagførandi kunning

**00.17.00-A00-4-16**

## 11. Støðutakan til leigusáttmála viðv. skrivstovuhøli hjá Sernám í Vági

### Málsfrágreiðing

Stjórin á Sernámi rykkir í teldubrævið tann 31. januar 2017 til kommununar í Suðuroynni eftir einari loysn av málinum. Setti stjórin á Sernámi, Magnus Tausen, skrivar bræv til borgarstjóran á Tvøroyri tann 24. oktober 2017, har hann heitir á borgarstjórarnar í Suðuroynni um at finna eina felags loyns í málinum.

Tann 3. november 2017 sendir borgarstjórin í Vági uppskot til leigusáttmála og kostnaðarætlan viðvíkjandi skrivstovuhølinum í Vági til Sernám, sí viðløgdu skjøl í málinum.



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Býráðið, 9. januar 2017, pkt. 3:**
Tvøroyrar Býráð samtykti einmælt, at býráðssamtyktin frá 31. desember 2016 stendur við.

**Býráðið, 13. februar 2017, pkt. 2:**
Býráðið samtykti einmælt, at býráðssamtyktirnar frá 31. desember 2016 og 9. januar 2017 standa við, sum tilmæla, at Sernám verður staðsett á Tvøroyri.

Býráðið viðmerkti einmælt, at tað hevur stóran týdning, at størvini innan virkisøki hjá Sernámi vera verandi í Suðuroynni og ikki flutt norður aftur til Tórshavn.

**Fíggjarnevndin, 13. november 2017, pkt. 4:**
Fíggjarnevndin samtykti, at mæla býráðnum til at bjóða Sernám v/Magnus Tausen, settum stjóra, á fund á Tvøroyri skjótast gjørligt, sum Magnus Tausen eisini viðmælir í skrivi til borgarstjóran, dagfest 24. oktober 2017.

## Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini, at bjóða setta stjóranum á Sernám, Magnus Tausen, á fund við býráðið skjótast gjørligt.

## Skjøl

- Bræv frá stjóranum í Sernámi til kommunurnar í Suðuroy
- Uppskot til leigusáttmála Vágsvegur 61.pdf
- Teldubræv frá borgarstjóranum í Vági við kunning og fíggjarætlan
- Tvøroyrar kommuna.pdf



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 17:50**

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Kristina Roest

Alvi Mortensen

Bjarni Hammer

Bogi Johannesen

Súsanna Bertholdsen



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12/2017 |
| Fundardagur | 13. november 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan